# Jan og Jóna sum rasara- og rallykoyrarar

**Í sambandi við kappingina Shell Helix Grand Prix 2004 hava tveir av vinnararunum av kappingini, Jan Niclassen í Havn og Jona Jensen í Vestmanna, verið í ávikavist Italia og Svøríki og roynt síni kynstur sum rasara- og rallykoyrarar**



Jona Jensen vann eina ferð til Sturup Raceway í Svøríki, har hon m.a. slapp at royna seg við at koyra á ATV-motorsúkklum, Land Rover- jeepum, og kappkoyring í Alfa Romeo 147 bilum

KAPPKOYRING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Shell hevði í 2004 eina spennandi kapping, sum nevndist SHELL HELIX GRAND PRIX 2004, sum allar bilasølurnar og verkstøðini í Føroyum luttóku í.

Hetta var ein kapping, har luttakararnir skuldu fylgja við í Formel 1 kappingini og svara nøkrum spurningum aftaná hvørja kapping. Drigið bleiv síðani millum luttakararnar um fleiri vinningar. 1. vinningur var ein ferð til Formel 1 kapping á Monza bananum í Italia í 2005, og 2. vinningur var ein ferð til Sturup Raceway í Svøríki at koyra rally. Teir hepnu vinnararnir vóru: Jan Niclassen, P/F DB-Bilar (1. virðisløn) og Jona Jensen, P/F Meinhardt Arge (2. virðisløn).

Ferðin til Monza í Italia byrjaði fríggjadagin 2. september 2005, har tað bleiv flogið úr Kastrup til Milano, fyri síðani at checka inn á Hotel Crown Plaza. Leygardagin 3. september var tíðarkoyring á Monza bananum, og sunnudagin 4. september var so sjálv kappingin. Flogið varð heimaftur til Kastrup mánadagin 5. september.

Hepni vinnarin av 2. virðisløn var Jona Jensen frá P/F Meinhardt Arge. Sunnudagin tann 19. juni varð farið við bussi frá høvuðsbanagarðinum í Keypmannahavn til Sturup Raceway stutt uttanfyri Malmø.

Her slapp Jona m.a. at royna seg við at koyra ATV-motorsúkklur (off-road). Aftaná tað varð farið í tveir Land-Rover, eisini off-road, har koyrt varð undir sera truplum og krevjandi umstøðum. At enda var kappkoyring í Alfa Romeo 147 bilum, har vinnarin fekk steyp til ognar.

Jan og Jona høvdu nakrar góðar og spennandi dagar í ávikavist Italia og Svøríki, har tey fingu roynt sínar førleikar sum kappkoyrarar.



*Jan Niclassen vann ferðina til Formel 1 kapping á Monza bananum í Italia fyrst í september 2005*









*Formel 1 kapping á Monza-bananum í Italia, har Jan Niclasen, sum vann 1. virðisløn, slapp at royna seg*